



- Minni sum fílur, verður ofta sagt um fólk, ið hava serliga gott minni, men børnum nýtist ikki minni sum á fíli, fyri at minnast ein túr í djóragarðin í Keypmannahavn

Tað eru bæði stór og smá djór í djóragarðinum. Otrar eru millum smærru djórini

# Við børnunum millum **fílarnar**

**Djóragarðurin í Keypmannahavn hevur alskyns djór, og tað er nakað annað veruliga at síggja tey heldur enn í sjónvarpinum**

**KEYPMANNAHAVN**

Um tit gera sum 1,2 milliónir onnur gera árliga, so fara tit eisini at vitja djóragarðin í Keypmannahavn, sum hevur verið til síðan 1859, og hóast upprunaligu djórini ikki eru har longur, so er djóragarðurin nú størri og fjølbroytnari, enn hann nakrantíð hevur verið.

Leyvur, tikarar, fílar, áarross, nashyrningar, kamelar og apur eru bara nøkur fá av eksotisku djórinum, sum fá er eftir av í heiminum í sínum natúrliga umhvørvið, og spurningurin er, um tit hava hug til at bíða við at uppliva hesi djór, áðrenn tey bara vera at finna á myndum.

Tí tað serliga við djóragarðinum er, at tit ikki bara síggja djórini. Tit hoyra tey og lukta tey eisini, og hóast tað helst hevði verið stuttligast at sæð tey í natúrligum umhvørvi, so er hendan næstbesta loysnin eisini góð.

Tit sleppa undan at ferðast alt ov langt. Ein stuttan busstúr ella biltúr í Keypmannahavn og tit eru longu í djóragarðinum.

Og túrurin gevur nógv. Tit fáa nevniliga møguleika at síggja næstan 4.000 djór av yvir 300 sløgum, og har eru líka frá ísbjarnum til geitir.

Hesar seinastu kunnu upplivast í barnadjóragarðinum, har tað enntá er møguleiki fyri at sita á ponyhesti.

Eisini er vert at nevna, at hóast tað er langt og nógv at ganga í djóragarðinum, so skulu tit ikki setast aftur av, at børnini ikki skuldu orka, tí fleiri staðni í garðinum ber til at fáa vognar, sum børnini og lutir annars kunnu setast í, so tað ikki er so møtimikið at flyta seg millum giraffar og úlvar.

Ein túrur í djóragarð kann gott vara ein heilan dag, og tað ber væl til at taka matpakka við, hóast garðurin eisini selir mat.



Leyvurnar stríðast ikki ov nógv, tá tað er heitt



At fáa sær ein vogn suma hendan, kann rættiliga skjótt loysa seg. Hann er væl egnaður til bæði børn og viðføri



Nas hyrningar hava sítt fasta pláss í djóragarðinum, og hóast teir koma úr Afriku, so dámar teimum væl skuggan